Kristina Háfoss, landsstýriskvinna

Røða í samband við barnakonsertir hjá Føroya Symfoniorkestur
22. apríl 2008

## 4000 børn til symfonikonsert – eitt megnar átak

Góðu børn, góðu fyrireikarar, góða samkoma.

Fyrst av øllum vil eg takka fyri, at eg varð boðin at bjóða tykkum øllum her í dag vælkomnum til barnakonsertina hjá Føroya Symfoniorkestri.

**Børnini eru framtíðin**
Talan er um eitt søguligt átak, tí hetta er helst eindømi um konsert, ið verður hildin fyri heili 4.000 børnum í Føroyum. Hetta svarar til 8-9 % av Føroya fólki.

Hesar konsertir røkka tí inn í stóran part av føroysku heimunum, og ongin ivi er um, at hesar konsertirnar hava ein týðandi leiklut fyri føroyskt tónleikalív. Ikki minst tí, at hesar eru við til at kveikja eldhuga fyri tónleiki millum okkara børn í Føroyum – tykkum, ið eru her í dag. Og tað eru tit – øll børnini – ið eru framtíðin hjá Føroyum, og hjá føroyskum tónleikalívi.

**Ein sólskinssøga**
Føroya Symfoniorkestur er ein verulig sólskinssøga í føroyskum mentanarlívi.

Orkestrið helt sína fyrstu konsert í 1983, í sambandi við at Norðurlandahúsið lat upp – og síðan tá hevur gingið støðugt framá. Úrslitið síggja vit í dag, har vit hava eitt framúrskarandi symfoniorkestur, nógvar professionellar spælarar, í og uttanfyri Føroyar, og hópin av kveikjandi konsertum og tiltøkum – so sum eitt nú hesar barnakonsertirnar.

Alt hetta er við til, at skapa eitt ríkari mentarnarlív, størri trivna og eitt meira spennandi føroyskt samfelag. Stóra tøkk fyri tað.

**Musikkskúlin leggur lunnar**
Áðrenn Føroya Symfoniorkestur varð sett á stovn, vórðu lunnarnir lagdir við Musikkskúlanum. Og hesin musikkskúli hevur við sínari virknu og skipaðu undirvísing runt landið, givið Føroyum hópin av dugnaligum og framkomnum tónleikarum. Alsamt fleiri av hesum nema sær eisini tónleikaútbúgving í útlondum, og kunnu liva av tónleikinum.

Hetta merkir eisini, at Føroya Symfoniorkestur vónandi fær støðugt fleiri “streingir at spæla á” – støðugt fleiri ung talent at manna orkestrið.

**Betri karmar**
Hóast stóru framgongdina hjá Føroya Symfoniorkestri, og ovurstóra áhugan millum børn í Føroyum, at nema sær tónleikaundirvísing umvegis Føroya Musikkskúla, so er hetta ikki nakað, ið vit mugu taka fyri givið. Tí hetta mennandi virksemi heldur ikki áfram, uttan so, at vit fjálga um hendan týðandi partin av føroyska mentanarlívinum.

**Tónleikurin gongur á odda**
Úrslitini av Føroya Musikkskúla og Føroya Symfoniorkestri eru í dag sera sjónlig. Hópurin av sólskinssøgum innan føroyskan tónleik – harav fleiri standa seg væl í útlondum – eru dømi, ið bera boð um hetta.

Ongin ivi er heldur um, at føroysk tónleikafólk í hesum døgum ganga á odda, tá umræður at sjónliggera Føroyar í útheiminum – og hetta hevur jaliga ávirkan á møguleikan hjá okkum sum samfelag at luttaka í alheimsgerðini.

**Gevur okkum eitt ríkari samfelag**

Mest av øllum gevur ríka tónleikalívið og virksemið hjá Musikkskúlanum, Føroya Symfoniorkestri og øðrum okkum í Føroyum eitt munandi ríkari samfelag – ein meira livandi og spennandi dagligdag. Hetta er við til at skapa altavgerandi karmar um eitt samfelag, ið børnini sum eru her í dag, vilja trívast og mennast í, nú og í framtíðini.

**Symfoniorkestrið klekir framtíðar tónleikarar**

Vil at enda takka Føroya Symfoniorkestri – og øllum eldsálunum har – fyri at hava tikið stig til hetta frálíka tiltak, ið uttan iva er við til at kveikja áhuga millum komandi tónleika-spírar. Hvør veit um ikki onkur framtíðar t.d. klaverleikari, violinspælari, tvørfloytuspælari í heimsklassa situr her í salinum í dag ?

Eg vil ynskja tykkum øllum eina góða konsert.